# B36 hægri enn nakrantíð áður




*B36 hevur ongan tíð áður vunnið greipuna, so dysturin móti HB skuldi vísa seg at gerast søguligur í fleiri mátar fyri árstalsfelagið*

**Aldursforsetin skal gera eina nýggja roynd í bestu deildini. Avgerðin um beinleiðis niðurflyting er útsett inntil leygardagin**

SAMANUM
*Jóannes Hansen*

B36 er føroyameistari 2001. Sunnudagurin var størsti dagurin í 65 ára longu søguni hjá elsta árstalsfelagnum í landinum. Tað er ongantíð komið fyri áður, at teir hava vunnið bæði steypakappingina og meistaraheitið.

Í løtuni er eingin ivi um, at B36 er besta felagið í Havnini. Fyri fyrstu ferð í meiri enn tredivu ár hava teir vunnið báðar landskappingardystirnar ímóti HB.

Tapið ímóti B36 hevur við sær, at HB ongan møguleika hevur at sleppa av sjeynda plássinum. Talan er um vánaligastu endastøðuna nakrantíð hjá HB, og tað er svíður sjálvandi, tá málið og ætlanin var í hvussu so er at kvalifisera seg til UEFA Cup fótbólt.

Hjá B36 er tað serliga hugaligt, at teir hava vunnið meistaraskap og steypakapping við nógvum monnum, sum eru uppvaksnir í felagnum.

Í áttati árunum var B36 tvær ferðir í 2. deild. Tá besta deildin í 1988 varð víðkað til tíggju lið, fekk B36 møguleikan í bestu deildini. Tá vóru fremmandir spælarar – eitt nú Meinhardt Dalbúð og Abraham Hansen – høvuðsálitini. Tað kemur sjálvandi væl við hjá B36, at John Petersen hevur spælt við teimum seinastu fimm árini, og Lakjumenninir, Pól Thorsteinsson, Arnbjørn Danielsen, Bjarni Prior og Egil Zachariassen pynta væl um.

Tað hugaliga er, at nú eru ungir B36arar, sum eiga bestu fótbóltsárini á, við til at mynda besta liðið. Tróndur Vatnhamar, Jan Guttesen, Klæmint Matras, Herbert í Lon Jacobsen, Kenneth Jacobsen, Jákup á Borg, Fróði Clementsen, Áki Mørk, Heini í Skorini og Niels Joensen eru dømi um hetta. Og sum hann hevur spælt, síðani hann slapp av við skaðan, kann tað væl vera, at erka B36arin Jens Kristian Hansen fer at spæla fleiri ár afturat!

Tá B36 í 1997 hevði vunnið FM, segði formaðurin, Kristian á Neystabø, at tað skuldu ikki ganga 35 ár til næsta meistaraheitið. Tað fór ikki at bera til hjá B36 at verða meistari á hvørjum ári, men teir skuldu vera við, har tað gekk fyri seg og vinna FM meiri enn eina ferð hvørt tíggju ára skeið.

Soleiðis segði formaðurin fyri fýra árum síðani. Í 1999 var um reppið, at ynskið hjá honum gjørdist veruleiki, og nú er tað vorðið tað. Tvífalt! Og so var tað enn ein sigur, at tað eydnaðist B36 at taka metið frá HB. Sigurin á B36 var tann trettandi á rað hjá B36. Metið frammanundan, sum var tólv dystir á rað, átti HB.

## Upp og niður

Um B71 ella FS Vágar skal flyta beinleiðis niður í 2. deild er ikki greitt enn. Tað mesta av 1. hálvleiki sá tað út til, at B71 og Eli Hentze skuldu senda FS Vágar niður í 2. deild, men B71 megnaði ikki at fáa stig í Runavík.

Tað er greitt, at TB skal loysa av í 1. deild. Tað ynskja vit teimum hjartaliga tillukku við. Aldursforsetin, sum seinast vann FM í 1987, hevur ein stóran setning at greiða. EB/Streymur hevur í ár víst, at tað ber til hjá uppflytaranum at standa seg í bestu deildini. Setningurin hjá TB verður at yvirliva. Skulu teir tað, so skulu – sum teir sjálvir siga – nýggir spælarar hjálpa til, og tað verður neyðugt við nógv meiri fyrireikingum, enn TB vísti í ár, tá teir fyrsta ikki so lítla partin av kappingarárinum fleiri ferðir skiftu venjara.

Tað er greitt, at Skála skal spæla um eitt pláss í bestu deildini. Tað verður ímóti B71 ella FS Vágum. Skálamenn hava ongantíð áður verið so ovarlaga, sum teir eru nú, og teir tykjast av álvara at ætla sær uppaftur longri upp.

Tað er greitt, at GÍ skal niður í 3. deild, og tað er greitt, at VB komandi ár verður umboðað í bæði 1. og 2. deild.

KÍ skal spæla um plássið í 2. deild. Mótstøðuliðið verður Royn, sum endaði næstfremst í 3. deild.

## Bronsan hongur

GÍ hevur langt síðani tryggjað sær silvurmerkini. Góða fyrra hálvan bar vónir um gull. Tí var tað ikki undarligt, at gøtumenn sunnudagin meiri kendu tað, sum um teir høvdu mist gullkrónurnar, heldur enn at teir høvdu vunnið silvurmerkini.

Tað er framvegis spenningur um triðja plássið. B68 er framvegis besta boðið, men við sigrinum á Eiði varðveittu nú fyrrverandi meistaraliðið úr Vági møguleikan fyri at vinna Intertoto Cup plássið.

Um B68 fær stig í Klaksvík, har teir seinastu trý árini hava tapt nógv, so verður bronsan á Toftum. Treytin hjá VB er, at teir skulu vinna, tá B36 og viðhaldsfólkini koma suður at taka ímóti FM steypinum og gullkrónunum. Og so er treytin hjá VB, at B68 einki stig fær í Klaksvík.

VB, NSÍ og KÍ hava øll møguleikan at enda á fjórða plássinum. VB hevur lagnuna í sínum egnu hondum. Um VB ikki fær stig ímóti B36, so hevur NSÍ møguleikan, um hvørki VB ella NSÍ fáa stig leygardagin, og um KÍ vinnur, so røkka teir fjórða plássinum.

Í síðsta umfarinum, sum verður á skránni leygardagin, verður spælt soleiðis: GÍ–B71, KÍ–B68, HB–FS Vágar, VB–B36 og NSÍ–EB/Streymur.



# Skála nærri teimum bestu enn nakrantíð áður

**Fótbólturin tykist hava loysr kappróðurin av, men vegurin í 1. deild, sum bara er tveir dystir burtur, tykist framvegis at vera sera trongur**

UPPFLYTAN
*Jóannes Hansen*

Líkindini vóru fín, og tað var nógv fólk kring vøllin á Skála leygardagin. Í staðin fyri heystjavndøgur illveðrið, sum ofta plagar at leika í hetta vikuskiftið, so var av fagrasta veðri. Eingir trupulleikar vóru av regni og vindi. Men ongantíð er alt í lagi. Hesa ferð vóru tað mýggjabitarnir, sum plágaðu, men tað tóktist ikki bila – hvørki inni á vøllinum ella uttanfyri.

Skála eigur sín stolta lut í føroysku ítróttarsøguni. Í kvinnufótbóltinum glógvaði tað rættuliga, tá tær í 1990 og í 1992 vunnu FM (tað seinnu árið vunnu tær eisini steypakappingina). Men á mannfólkasíðuni er tað ikki í fótbóltinum, at teir á Skála um sumrarnar hava gjørt um seg. Heldur hevur tað verið í kappróðrinum, har Skálabáturin og Svanur í farnum árum hava verið óførir. Í summar sást einki til Svanin, og avrikini hjá Skálabátinum í summar verður ikki tosað so nógv um. Men tá prátið kemur inn á 2. deildarliðið hjá Skála, tykist áhugin vera stórur. Fótbólturin tykist av álvara hava loyst kappróðurin av sum summarítróttin á Skála.

Leygardagin vóru áskoðararnir komnir at síggja teirra lið vinna, og tað var týðuligt, at tey vónaðu, at sigurin skuldi bera uppflyting til bestu deildina við sær. Í tí loynda mundi vera so mikið fyrireikað, at tey vóru klár at lofta støðuni, um tað nú skuldi fallið soleiðis, at heimasigurin fór at bera atgongumerkini til bestu deildina við sær.

Største áhugan í 2. hálvleiki høvdu útvarpslurtini kring vøllin. Tað var væl skiljandi, at fleiri illneitaðust, tí tey hildu tað vera varpað ov nógv út í Runavík og á Skála. Hvussu alt skuldi laga seg var treytað av gongdini og úrslitinum suðuri á Krossinum.

Meðan áskoðararnir koyrdu á sínar, harmaðust teir um, at tað dygst undan hvíldini eydnaðist tvøråmonnum at leggja seg á odda í Sumba. Spilti møguleikin ímóti sumbingum á Skála tvær vikur frammanundan var uppi og vendi, og eingin ivaðist í, at sjálvt um sumbingar høvdu verið so óhepnir at gera sjálvmál, so løgdu teir alt tað fyri ímóti TB, sum teir orkaðu.

Á síðulinjuni dýktu hóvligu Jústinus Justinussen og Asbjørn Mikkelsen undir sínar menn. Teir duga so mikið væl at fara við fólkinum, at tað fer at hava stóran týdning í uppflytingardystunum.

### Liðið

Inni á vøllinum var Leivur Justinussen í málinum. Sum í rættuliga avgerandi dystinum í Fuglafirði næstsíðsta leygardag, vísti hann aftur hesa ferð, at hegnið og stílurin eru, sum tey eiga at vera. Liðformaðurin, Pauli Poulsen, er aftastur, og evnini at lesa spælið og styrkin í nærdystunum eru góð. Frammanfyri var Bent Djurhuus, og í borðunum vóru Janus Trúgvason í høgru og Kaysten Rasmussen í vinstru. Bara tjúgu mál eru farin ígjøgnum. Tað eru níggju færri enn hjá ÍF, sum tað er skorað næstminst ímóti. Tað boðar frá, at teir á Skála hava verið óførir at hildið tætt.

Á miðvøllinum vóru fýra spælarar. Marius Joensen (hann var komin av flatlondum at hjálpa til) í høgru og Sveinur Justinussen í vinstru vóru skjótir út í borðini, tá heimaliðið fór í álop, og á sentrala miðvøllinum royndu Tummas Olsen og Pauli Hansen at stýra og tetta, meðan Bogi Gregersen og Alexander Johansen hesa ferð vóru málsóknir á toppinum. 6–1 sigurin ímóti KÍ pyntði væl um, men annars hevur tað verið eitt sindur striltið við málskjótingini. Tað endaði við, at Skála í alt hevur skorað 35 mál. Tað eru væl færri, enn bæði ÍF og serliga TB skoraðu, og bæði B36 og Sumba megnaðu í átjan landskappingardystum at skora fleiri mál enn Skála.

Umframt teir fyrstu ellivu komu tríggir aðrir á vøllin leygardagin: Jørmund Joensen, Ólavur Olsen og Jóhannes Mikkelsen. Eykamálverji var Annfinn Djurhuus. Arnold Berg Danielsen var eisini á beinkinum. Ronnie Hansen, sum áður hevur spælt við GÍ, var leikbannaður, og Arnold Berg, sum áður hevur verið á U–16 landsliðnum, var skaddur.

### Møguleikin er har

Hóast stórsigurin og silvurkrónurnar, sum Dánjal Andreasen handaði, so var sigursrómin ikki tann, sum teir frammanundan høvdu droymt um. Síðstu minuttirnar fór okkurt av fýrverkinum í orðsins rætta týdningi upp í royk. Tá sumbingar sendu í TB stólpan, mundu hugsanirnar verða sendar til rakettirnar og sjampanjufløskurnar, sum lógu fjaldar í taskunum. Men tær komu ikki fram í ljósið. Felagið hevði opið hús leygarkvøldið. Suppan, kaffi og smákøkurnar vóru á skránni, og tað var hugnaligt. Men aftur og aftur varð vent aftur til fullkomuliga óneyðugu tapini – ikki minst tá Skála tapti 1–0 í Gøtu!

Um kappingarárið skal enda við fyrstu uppflytingini nakrantíð til 1. deild, verður avgjørt aftaná mikkjalsmessu, tá lagnan hjá sjampanjuni og fýrverkinum eisini verður seglað.

Besta deildin er tveir dystir burtur, men sandoyingar ella vágamenn fara at gera alt fyri at dyrnar til dreymalandið skulu vera stongdar fyri skálamonnum. Dánjal Andreasen ynskti tillukku, og um eydnan verður við skálamonnum, so verður komandi ár helmingurin av liðunum í bestu deildini úr Eysturoy.

HB-GÍ 6-4 (3-2):

## Endaðu við málveitslu

**Næst bestu menninir hjá GÍ søgdu leygardagin farvæl við aðru deild á hesum sinni, men fáu áskoðararnir í Gundadali fingu um ikki annað hópin av málum í avskedsdystinum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað var sjónligt, at hvørgin parturin hevði nakað serligt at spæla fyri, tá GÍ og HB dystaðust í Gundadali.

Havnarliðið hevur seinastu umførini verið ógvuliga skert, tí fleiri av stuðlunum eru togaðir upp á besta liðið, og tí hevur dreymurin um heiðursmerki kámast alt meira, sum umførini eru liðin. Gøtumenn vóru longu dømdir at flyta niður undan dystinum, og alt hetta sást eisini aftur í hugburðinum, tá liðini avgreiddu seinasta setningin á árinum.

Eftiransingarnar vóru alla tíðina leysar, stríðsviljin restaði fyri ein stóran part, og úrslitið gjørdist eisini, at dysturin nærum var átøkur eini venjing, har spælt verður upp í 10.

### Endaðu við 10

Tað vóru gøtumenninir, sum byrjaðu dystin betri, men kortini slapp HB at leggja seg á odda, men skjótt svaraðu gestirnir aftur. Seinasta helmingin av hálvleikinum fekk HB so tvey mál, og í seinna hálvleiki helt gongdin fram, áðrenn gøtumenn aftur sluppu upp í part.

Gestirnir megnaðu at stríða seg upp á javnt, men tá HB so fyrst skoraði til 5-4, og málverjin hjá GÍ lítla løtu seinni varð rikin av vøllinum, tóktist luftin fara úr teimum, og hóast onkrar einstakar royndir vóru eftir hetta, so var einki at ivast í, at dysturin fann sín rætta vinnara.

Fyri HB skeyt Danny Rasmussen trý mál, meðan Henrik Rubeksen, Rógvi Joensen og Sámal Erik Hentze skutu hvør sítt. Marek Wiegel, Hans Erik Davidsen, Jan Skoradal og Magnus Dalbø skutu málini hjá GÍ.



*Skála er nú nærri bestu deildini, enn teir nakran tíð hava verið áður*
*Mynd: Jóannes Hansen*